J.nr.: F.K. 00-04-
Dato: 05. juli 2007
Okkara ref. SSS/JFL
E-postur: fko@fuglakomm.fo
Heimasíða: www.fuglakomm.fo

# F U N D A R F R Á S Ø G N

**frá eykabýráðsfundi nr. 09/2007**

Ár 2007 tann 05. juli kl. 16.30 varð eykabýráðsfundur hildin í býráðssalinumi, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 29. juni 2007 um innkalling til fundar.

**Møtt vórðu:**
Sigurð S. Simonsen
Jann Toftegaard
Dánjal Vang
Signar á Brúnni
Elisabeth D. Eldevig Olsen
Eyðun á Lakjuni
Tórfríður Abrahamsen
Petur Abrahamsen

Jón Nolsøe Olsen møtti ikki á fundinum. Hann hevur onga fráboðan latið borgarstjóranum um møguliga fráveru, sí annars viðmerkingar um hesi viðurskifti í fundarfráboðanini 29. juni 2007.

Skrivari: Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 50/2007.**

**2. viðgerð av eykajáttan til økið "Oljubryggjan" konto 222088.**

Í 2006 samtykti býráðið at játta kr. 12.500.000,00 til íløgu í nýggja oljubryggju á Enninum.

Tá ið fíggjarætlanin fyri 2007 var til viðgerðar boðaði tekniska deild kommununar fíggjarnevndini frá, at oljubryggjan helst ikki varð liðug í 2006, og at umleið kr. 2,5 mió. tí áttu at verið fluttar frá fíggjarárinum 2006 til 2007.

Hetta varð gjørt soleiðis, at játtanin upp á kr. 2,5 mió av teimum upprunaligu kr. 12,5 mió. vórðu fluttar fram til 2007, og skuldu verða fíggjaðar av innistandandi peningi, tí peningurin varð tøkur til endamálið.

Sjálv bryggjan er liðug, men enn væntar at leggja vatnrør á økið, nakað av planeringsarbeiði og asfaltering. Hetta arbeiðið er mett at kosta umleið kr. 1,5 mió., og hevur málið verið umrøtt í býrásleiðsluni.

Býráðsleiðslan hevur sambært reglugerðina um fíggjarstýring av kommununi § 3,1 sent málið til havnanevndina til viðgerðar, somuleiðis sum heitt verður á nevndina um at koma við tilmæli til fíggjarnevndina, so málið kann verða lagt fyri býráðið til avgerðar, um veitast skal ein eykajáttan til arbeiðið, sum sambært § 3,5 í reglugerðini kann verða fíggjað av innistandandi peningi, lántøku, meirinntøkum ella við umflytingum av játtan á íløgukontobólkinum undir Fuglafjarðar havn.

Havnanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 14. juni 2007 og mælir nevndin til, at arbeiðini verða gjørd í 2007, og at heitt verður á fíggjarnevndina um at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 1,5 mió til arbeiðið í inniverandi fíggjarári.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt tilmæli frá havnanevndini á fundi 14. juni 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 1,5 mió. til arbeiðið við liðuggerð av oljubryggjuni í inniverandi fíggjarári, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri.

Vísandi til § 41, stk. 2 í somu lóg og § 3,5 í reglugerð um fíggjarstýring av Fuglafjarðar kommunu verður mælt til, at eykajáttanin kr. 1,5 mió. verður fíggjað av konto 222035 í bólki 2 "Havnagerð", har avsettar eru kr. 9,0 mió. í 2007. Sostatt verður talan um eina umflyting í bólki 2 millum konto 222035 og 222088 upp á nevndu upphædd.

Sostatt er bert talan um umflyting av íløgujáttan í bólki 2.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, sum hóast alt í hesum føri ikki ber eykaútreiðslur við sær, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í insta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini, og skal avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar eftir samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 20. juni 2007, og vórðu tilmælini frá havnanevndini og fíggjarnevndini um liðuggerð av Ennibryggjuni við uttanumøki varð samtykt. (7-0). Somuleiðis varð samtykt at beina málið um eykajáttanina til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi ella eykabýráðsfundi. (7-0).

**Avgerð:**

Samtykt varð við 2. viðgerð av veita eykajáttan sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini frá 14. juni 2007. (7 atkv. Fyri og 1 stkv. Ímóti. Ímóti atkvøddi Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 51/2007.</u>**

**2. viðgerð av eykajáttan til økið "Lærararstovan vm." konto 445040.**

Skúlabygginevndin hevur á fundi tann 14. juni 2007 viðgjørt yvirlit yvir kostnað av omanfyri nevnda arbeiði saman við Jákup Paula Johannesen, arkitekti frá Fuglø arkitektum, 700 Klaksvík.

Avsettar eru kr. 400.000,00 til arbeiðið í 2007 á konto 445040, men sambært yvirlitinum hjá Jákup Paula verður kostnaðurin:

| | | |
|---|---|---|
| Sambært skjal: | kr. | 1.052.597,89 |
| + restkeyp av innbúgvi umleið | kr. | 108.000,00 |
| + skiftan av vindeygum og nýggj skáp til fuglarna | kr. | 89.402,11 |

Íalt umleið ***kr. 1.250.000,00***.

Skúlabygginevndin heitir í skrivi, dagfestum 14. juni 2007 á mentamálanevndina um at viðgera hetta mál, sum ber eina eykajáttan við sær upp á kr. 850.000,00, so arbeiðið kann verða gjørt í summarfrítíðini.

Býráðsleiðslan hevur sambært reglugerðina um fíggjarstýring av kommununi § 3,1 sent málið til mentamálanevndina til viðgerðar, somuleiðis sum heitt verður á nevndina um at koma við tilmæli til fíggjarnevndina, so málið kann verða lagt fyri býráðið til avgerðar, um veitast skal ein eykajáttan til arbeiðið, sum sambært § 3,5 í reglugerðini kann verða fíggjað av innistandandi peningi, lántøku, meirinntøkum ella við umflytingum av játtan á íløgukontobólkinum undir Fuglafjarðar skúla.

Mentamálanevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 14. juni 2007 og mælir nevndin til, at arbeiðini verða gjørd í 2007, og at heitt verður á fíggjarnevndina um at heita á býráðið um at veita eina eykajáttan upp á kr. 850.000,00 til arbeiðið í inniverandi fíggjarári.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt tilmæli frá mentamálanevndini á fundi 14. juni 2007, og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 850.000,00 til arbeiðið í sambandi við umbygging av lærarastovuni o.ø. í inniverandi fíggjarári, hetta sambært § 41, stk. 1 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mei 2000 um kommunustýri og skrivi frá skúlabygginevndini, dagfest 14. juni 2007.

Vísandi til § 41, stk. 2 í somu lóg og § 3,5 í reglugerð um fíggjarstýring av Fuglafjarðar kommunu verður mælt til, at eykajáttanin kr. 850.000,00 verður fíggjað av konto 445010 í bólki 4 "Skúlin nýíløgur, har avsettar eru kr. 2,1 mió. í 2007. Sostatt verður talan um eina umflyting í bólki 4 millum konto 445010 og 445040 upp á nevndu upphædd.

Sostatt er bert talan um umflyting av íløgujáttan í bólki 4.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, sum hóast alt í hesum føri ikki ber eykaútreiðslur við sær, so skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í insta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í kommunustýrislógini, og skal avgerðin verða kunnað Innlendismálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar eftir samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2.3. í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi tann 20. juni 2007 og vórðu tilmælini frá mentamálanevndini og fíggjarnevndini um gerð av arbeiðinum við umbygging av lærarastovuni vm. í 2007 vórðu samtykt. (7-0). Somuleiðis varð samtykt at beina málið um eykajáttanina til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi ella eykabýráðsfundi. (7-0).

**Avgerð:**

Samtykt varð við 2. viðgerð av veita eykajáttan sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini frá 14. juni 2007. (6 stk. fyri og 2 stkv. Ímóti. Ímóti atkvøddu Signar á Brúnni og Tórfríður Abrahamsen).

**<u>Mál nr. 52/2007.</u>**

***Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 143am.***

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið umsókn frá Poulinu Abrahamsen og Jørleif Petersen, dagfest 21. apríl 2007 um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 143am áfest í sethúsini á vestaru síðu á parkeringsøki, sum tey hava á nevnda matrikuli.

Tey hava áður søkt um byggiloyvi, men fingu noktandi svar, tí eftir tekningini varð bilhúsið ov stórt, og hava tey nú broytt tekningina og minka bilhúsið, hetta sambært hjálagdari tekning.

Tá ið bygt verða í mark móti matr. nr. 143an, er málið tann 15. mei 2007 sent Willy Jan feilberg. Tá hoyringsfreistin var úti tann 06. juni 2007 vórðu ongar viðmerkingar innkomnar til ætlaðu bygging.

Willy Jan hevur tó í samrøðu við býarverkfrøðingin greitt frá, at hann kann góðtaka ætlaðu bygging, sum nú er 1,2 metrar styttri í mun til ætlaðu bygging. Tó ynskti hann trygd fyri, at bygningurin, sum verður í mark, verður væl viðlíkahildin.

Vísandi til at hesin bygningur nú er nakað minni enn tann, sambært áður viðgjørda umsókn, og grannin frammanundan hevur bygt í mark, metir tekniska nevndin, at hetta mál kann verða viðgjørt sum eitt minni frávik til byggisamtyktina.

Tekniska nevndin hevur viðgjørt umsóknina á fundi 29. juni 2007, og mælir út frá hesum býráðnum til, at byggiloyvi verður givið soleiðis, at kunngerð um brunaverju frá 9. apríl 1992 verður fylgt, og at veggurin móti matr. nr. 143an verður gjørdur sum brandveggur.

Byggiloyvið verður galdandi 2 ár frá útskrivingardegnum.

**Avgerð:**

Tilmæli frá teknisku nevndini varð samtykt. (6-0). Meðan málið varð viðgjørt vóru Petur og Tórfríður Abrahamsen ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 53/2007.</u>**

***Viðvíkjandi legusáttmála við P/F Faroe Bunkers.***

Havnanevndin hevur móttikið uppskot frá fyrisitingini, dagfest 28. juni 2007 til leigusáttmála millum kommununa og P/F Faroe Bunkers um leigu av grundøki matr. nr. 239ai á havnarøkinum í Fuglafirði at nýta til oljugoymslu, bygningar vm. í sambandi við teirra virksemi.

Talan er um eitt leiguøki upp á 3.233 fermetrar, hetta sambært skriv frá Matrikulstovuni, dagfest 20. juni 2007.

Uppskotið til sáttmála hevur verið til viðgerðar á fundi í havnanevndini tann 29. juni 2007, og varð hetta gjøgnumgingið og rættingar/broytingar framdar á sjálvum fundinum.

Nevndin mælir býráðnum til at góðkenna fyriliggjandi uppskot til leigusáttmála partanna millum fyri øki til oljutangagoymslu á matr. nr. 239ai á havnarøkinum í Fuglafirði.

Uppskotið varð annars sent felagnum til viðmerkingar við telduposti tann 28. juni 2007, og telduposti, dagfestur 29. juni frá teimum verða ymiskir spurningar settir fyrisitingini. Havnanevndin hevur tann 29. juni 2007 kl.9.28 sent teimum broytta uppskotið, sum lagt verður fyri býráðið á eykabýráðsfundi tann 05. juli 2007, og verður boðað frá kl.09.48, at teir góðtaka sáttmálan.

Við teldupsoti frá 29. juni kl. 11.54 verður boðað frá, at Magnus Pauli Joensen, verkfrøðingur hjá P/F Faroe Bunkers onga viðmerking hevur, uttan so, at hann heldur, at rímiligt er, at kommunan leggur ein 6" vatnleiðing til goymsluna, nú teir mugu hava sprinklaraskipan á tangarnar, og møguliga eina kloakk. Annars verða teir noyddir til at veita kloakkina út á sjógv.

**Avgerð:**

Tilmæli frá havnanevndini varð samtyukt. (7-0). Meðan málið varð viðgjørt var Elisabeth D. Eldevig ikki á fundi vegna ógjegni.

**<u>Mál nr. 54/2007.</u>**

**Kunning um avtalu um barna- og ungdómstannrøkt.**

Á fundi á kommunuskrivstovuni í Runavík tann 25. juni 2007, har Eyðun á Lakjuni, Irena Olsen og Marin S. Thomsen umboðaðu Fuglafjarðar kommunu, løgdu tannlæknararnir, sum hava sáttmála við kommunurnar fram eitt samráðingarupplegg, har grein 1 í avtaluni verður víðkað við einum stk. 4:

Har børn við somu brekum sum tey í Danmørk koma undir regiontandplejen, eru ikki umfatað av avtaluni.
Greitt varð frá, at talan er um sera torfør børn, sum kanska magnla nógvar tenn, hava deforman gana ella líknandi. Upplýst varð, at í Nes og Runavíkar kommunum hevur einki sovorðið barn verið í 13 ár, so tað fyrikemur ikki ofta, og tað, sum tannlæknararnir vistu um, varð viðgjørt av sjúkrahúslæknunum.

Grein 2 verður víðkað við stk. 5: Fellur tannlæknin frá og gevst við sínum virksemi, tekur avvarðandi kommuna ábyrgdina av skipanini.

Partarnir gera eina avtalu um, hvussu prístalsreguleringin verður gjørd í sáttmálaskeiðnum.

Árligi eindarprísurin verður hækkaður til ímillum kr. 2.375,00 og kr. 2.451,00 fyri hvørt barnið um árið.

Núverandi sáttmáli frá 2001 byggir á ein eindarprís pr. barn pr. ár upp á kr. 1.900,00, sum hesi árini er prístalsreguleraðuer til í okkara føri at verða kr. 2.081,34. Hetta gevur ein samlaðan kostnað fyri Fuglafjarðar kommunu í 2007 upp á kr. 749.412,00, sum verður goldið mánaðarliga við kr. 62.451,00.

Skal eindarprísurin hækka upp í kr. 2.375,00 pr. barn/ár verður árligu kostnaðurin við núverandi barnatali upp á 358 kr. 820.250,00. Talabn er um ein mun upp á kr. 100.838,00.

Skal eindarprísurin hækka upp í kr. 2.451,00 pr. barn um árið verður árligu kostnaðurin við núverandi barnatali upp á 358 kr. 877.458,00. Talan verður her um ein mun upp á kr. 128.046,00.

Á góðkendu fíggjarætlanini fyri 2007 eru avsettar kr. 765.000,00 til "Tannlæknarøkt av børnum".

Fundur hevur aftur verið tann 04. juli 2007 kl. 10.00 í býráðssalinum hjá Runavíkar kommunu, og á hesum fundi luttóku okkara vegna Sigurð S. Simonsen, Eyðun á lakjuni og Irena Olsen.

Á hesum fundi varð semja um, at gjaldið pr. barn verður ásett til kr. 2.400,00 frá 01. januar 2008 at rokna.

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 18.15.

Jann Toftegaard | Eyðun á Lakjuni

Dánjal Vang | Tórfríður Abrahamsen

Signar á Brúnnii | Petur Abrahamsen

Elisabeth D. Eldevig

Sigurð S. Simonsen

// Jákup Frants Larsen
býráðsskrivari